VÍF-StÍF 24-21 (13-10):

# Ein steypaklassikari




*Fagnaðurin var ovur stórur á strandingum, tá teir eftir ein framúr spennandi dyst í Vestmanna høvdu tryggjað sær finaluplássið í steypakappingini*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Seinna hálvfinalan ímillum VÍF og StÍF var sjálv ímyndin av einum steypadysti. Ein dystur, har alt stendur upp á spæl, har liðini geva seg fult út og har spenningurin er varðveittur til seinasta bríksl**

COCA-COLA KAPPINGIN – MENN
*Jákup Mørk*

Í upptaktini til hálvfinaluarnar varð sagt, at spenningurin uttan iva var størstur í Vestmanna, har VÍF skuldi royna at vinna tey fýra málini frá fyrru hálvfinaluni aftur.

Eftir dystin kann í øllum førum staðfestast, at her varð ikki skotið við síðuna av, tí tað er ikki á hvørjum degi og heldur ikki ári, at spenningurin á og kring leikvøllin er so stórur, sum hann var í Vestmanna mikukvøldið.

**Broytt VÍF lið**

Vestmenningar vóru nakað skerdir undan dystinum, tí tað var greitt, at Áki Olsen als ikki var førur fyri at spæla. Í oddadystinum móti Neistanum herfyri royndi hann annars at vera við, men tá varð skjótt greitt, at eymi lærkrikin darvaði ov nógv.

Hinvegin er tað ein avgjørdur styrkur, at Sámal Joensen nú aftur er førur fyri at spæla, eftir at ryggurin annars hevur darvað honum eina tíð, og saman við Piti Negru varð Sámal nú kosin til at vera stóra skotstyrkin frá bakkinum, eins og teir báðir stóru menninir sjálvsagt vóru lyklaspælarar í verjupartinum.

**Ferð var á**

Tað stóð skjótt greitt, at VÍF hevði í hyggu at vinna tey fýra málini frá Skála inn aftur sum skjótast. Frá fyrsta bríksli varð nógv lagt fyri í álopspartinum, og tó at verjan var heldur skinklandi fyrstu løtuna, so kom tó eisini betri skil á her so við og við.

Leingi gekk tó sera striltið at sleppa frá strandingunum, tí eins og VÍF legði nógv fyri í royndunum at vinna aftur, so løgdu strandingar ikki minni fyri, nú teir »bara« skuldu halda fast í mótstøðuni. Ein leiklutur, sum ofta vísur seg at vera sera vandamikil, tí í bakhøvdinum vita leikararnir, at teir hava ráð at tapa við trimum málum, heldur enn at skula vera noyddir at vinna.

Eitt skifti sá soleiðis út til, at gestirnir alla tíðina skuldu halda fast, men eftir at VÍF skifti út á málverjaplássinum, fór at dragna. Vanliga hava teir báðir, Bárður Nielsen og Eli Müller stríðst um plássið, men nú Eli er skaddur, hevur Jón Nielsen verið varðamaður. Higar til hevur Bárður hvørja ferð verið fremsta valið til sessin, men tá hann ikki tóktist hava sín besta dag, varð skift út, og so slapp Jón at prógva, hvør dugur er í honum.

Spakuliga tók VÍF seg frá, og hóast strandingar alla tíðina royndu at halda fast, so stóð 13-10 á talvuni í hálvleikinum. Eitt mál á muni samanlagt.

**StÍF var ørkymlað**

Steðgurin gav helst báðum pørtum tíð at grunda um støðuna, og tað var stuttligt at síggja, hvussu hetta tóktist ávirka liðini, tá farið varð undir seinna hálvleik.

Vestmenningar vistu nú, at tað so væl og virðiliga var innan fyri møguleikannar mark at vinna við fýra málum, og teir settu alt fyri eitt fulla ferð á.

Hjá strandingum var støðan hinvegin júst tann øvugta. Innan fyrstu 30 minuttirnar høvdu teir mist mest sum allan fyrimunin frá fyrra dystinum, og tó at teir framvegis vóru á odda samanlagt, so er eitt einsamalt mál ikki tað stóra. Ikki minst tá spælt verður ímóti VÍF í Vestmanna.

Spenningurin hevði sjálvandi eisini sína ávirkan á áskoðararnar, sum nú veruliga fóru at geva ljóð frá sær. Fyri hvørt mál, sum vestmenningar nú drógu frá, gjørdust eyðkendu »hey-hey-hey…« rópini frá vestmenningum alt ljóðligari, og frøin á leikarunum var eyðsýnd, nú teir enn eina ferð tóktust hava vent eini svárari støðul.

Bert átta minuttir inn í seinna hálvleik hevði VÍF vunnið seg seks mál framum. Strandingar vóru í villareiði. Fingu als ikki fatur á skjútunum hjá VÍF, har serstakliga Sámal ferð eftir ferð kanóneraði bóltarnar inn um sakarsleysa Marian í StÍF málinum. Somikið hjálparsleysur var rumenski málverjin, at hann fleiri ferðir heitti á beinkin um at taka time-out, og tá 10 minuttir vóru leiktir, var hetta honum loksins eftirlíkað.

**Alt á gosið**

Seinastu 20 minuttirnir av dystinum verða helst nakrir, sum leingi hanga við í minninum hjá teimum 600 áskoðarum í høllini.

Eftir stutta steðgin, sum eitt time-out gevur, var tað eitt hamskift StÍF lið, sum nú kom á vøllin. Skiftandi mansverja av Sámal Joensen og Inga Olsen var við til at steðga álopsspælinum hjá VÍF, og yvirhøvdu løgu teir nú í krovinum á hvørjum einasta vestmenningi, so skjótt hesir komu inn um tríggja-metra linjuna. Líka mikið, hvussu heimamenninir royndu seg, so var ein forðing fyri, og hetta gjørdi sjálvsagt, at ferðin var snarað longur og longur upp.

Í álopspartinum varð somuleiðis lagt eins nógv fyri. Press-spæl og gjøgnumbrotsroyndir vórðu settar á breddan, og tá bæði útvísingar og brotskøst spurdust burturúr, skuldi verið gjørligt hjá StÍF at vunnið seg fram. Men brotskøstini vórðu misnýtt. VÍF treiskaðist sjálvt við fýra móti seks, so frambrotið mátti bíða. Men tað kom kortini.

StÍF minkaði munin niður í trý, og hevði nú finalusessin, men VÍF svaraði kortini aftur. Eftir tíggju málleysar minuttir smekkaði fyrst Sámal og síðani Ingi til, og so var aftur viðvent.

Rópini vóru hvøll frá báðum pørtum. Heimaáskoðararnir fegnaðust um leiðsluna, meðan gestirnir royndu at eggja sínum enn meira. Leikararnir fóru mest sum fyrilagstir undir seinastu løtuna. Hvør og ein vistu teir, at tað var nú ella ongantíð, um finaluplássið skuldi tryggjast. Munurin sveiggjaði millum tey trý, sum sendu StÍF víðari og tey fýra, sum høvdu bjargað við grundað á regluna um mál á útivølli, men avgerðin bíðaði til seinastu løtui.

**20 sekund í ekstasu**

Við 30 sekundum eftir skeyt Sámal Joensen sítt 12. mál í dystinum, men StÍF hevði framvegis møguleikan. VÍF royndi at trýsta teir til at royna seg av veinginum, og hetta eydnaðist, sum so. Bólturin varð spældur til Alexandur Johansen, og av veinginum sendi hann bóltin í meskarnar.

Strandingar vóru upp frá í fagnaði, men enn var ikki liðugt. VÍF fekk tríggja metra kast burtur úr seinastu álopsroyndini, men tá hetta brast í manngarðin, var leyst og liðugt. Aftur í ár høvdu strandingarnir bast VÍF í steypakappingini, og tað er spurningurin bert, um teir eisini fara at vinna finaluna. Tann spurningurin má bíða í tíggju dagar, og fram til tá kunnu strandingarnir hóskandi hvíla seg, tí einki er at ivast í, at beinini vóru moyr, tá gysarin í Vestmanna var komin at enda.

**Dysturin í tølum**

**VÍF-StÍF 24-21 (13-10)**
StÍF víðari við samanlagt 48-47
Málskjúttar:
VÍF: Sámal Joensen 12(1), Ingi Olsen 4, Rógvi Nielsen 2, Agnar Joensen 2, Piti Negru 2, Ragnar Zachariasen 1, Daniel Rápa 1
StÍF: Costin Dumitrescu 10(5), Artur Johansen 4(1), Jón Rasmussen 2, Marius Joensen 2, Andre F. Danielsen 2, Alexandur Johansen 1
Brotskøst: VÍF 1, StÍF 8
Útvísingar: VÍF 3, StÍF 3

Framhald á síðu 23



*Hjá VÍF var tað uttan iva ein smeitur, at ein skaddur Áki Olsen ikki fekk gjørt aðra nyttu á vøllinum...*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



Framhald av síðu 22

Dómarar úr Tjaldri: Kári Hansen & Trúgvi Mortensen. Ógvusliga leikferðin og intensiteturin í dystinum gav teimum trupulleikar, men tó at nógv stóð á, so hildu teir alla tíðina høvdinum kalt.

# Smekkaði til

**Fyri trimum árum síðani misnýtti hann, men hesa ferð tryggjaði Alexandur strandingum sigurin á VÍF**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Steypafinalan á várið 1999:

VÍF er á odda við einum máli móti StÍF, og bert fá sekund eru eftir at spæla. Alexandur Johansen verður leiktur leysur á høgra veingi, leypir inn móti málinum og lobbar – bólturin fer upp um. Løtu seinni er alt liðugt, at VÍF er steypavinnari.

**Smekkaði til**

Sum kunnugt var støðan vend á høvdið mikukvøldið, tá Alexandur við seinasta málinum í dystinum tryggjaði StÍF sigurin á VÍF.

Eftir dystin spurdu vit Alexandur, um hann undan hesum dystinum hevði hugsað nakrar tankar um finaluna í 1999.

- Eg havi hugsað nógv um handan kjansin síðani ta ferðina, men ikki undan hesum dystinum. Hesa ferð vistu vit bara, at vit ikki máttu tapa samanlagt, og tá eg fekk kjansin í dag, so hugsaði eg ikki um at brenna. Bólturin skuldi bara í kassan, so eg smekkaði til, segði ovurfegni match-vinnarin eftir dystin.

*- Eg havi hugsað nógv um handan kjansin síðani ta ferðina, men ikki undan hesum dystinum*



# Christan Høgni í Vejle

**Nýggi venjarin hevur sýnt áhuga í at gera sáttmála við runavíkingin, sum í løtuni royndarvenur við superligufelagnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Christian Høgni Jacobsen venur í løtuni við Vejle, har nýggi venjarin hevur sýnt stóran áhuga í at fáa sáttmála við føroyska landsliðsleikaran*

Donsku superligufeløgini fyrireika seg í hesum døgum til seinnu helvt av kappingarárinum, og flestu staðni eru broytingar av ymsum slag farnar fram.

Eitt nú hjá Vejle, har Frenk Petersen er settur sum nýggjur venjari. nýggjur venjari. Nýggjur venjari merkir aloftast broytingar í aðrar mátar, og Frank Petersen hevur eisini sýnt áhuga fyri nøkrum nýggjum leikaram.

Ein av hesum er sambært danska fótbóltsportalinu, www.onside.dk, runavíkingurin, Christian Høgni Jacobsen, sum í løtuni royndarvenur við Esbjerg.

Christian Høgni var í heyst knýttur at Esbjerg, men sum skilst er hesin sáttmáli ikki longdur, og tí venur hann nú við Vejle, sum eisini hevur sýnt áhuga fyri fótbóltsevnum hansara áður.

Við onside sigur Frank Petersen, at Christian Høgni Jacobsen heilt víst verður ein styrkur fyri álopið hjá Vejle, og eftir hesum at døma er tað mest sum víst, at sáttmáli verður skrivaður við føroyska landsliðsmannin.

# Lutakastið verður í dag

**Spurningurin um komandi mótstøðuliðini hjá Føroyum í EM-undankappinini verður avgreiddur beint fyri døgurða í dag**

EM-LUTAKAST
*Jákup Mørk*

Í dag, fríggjadagin, kl. 11.00 verður lutur kastaður um, hvussu bólkarnir til komandi HM-undankapping verða settir saman.

Føroyar eru sjálvandi eisini við í hesum, og fyri FSF eru Ísak Mikladal, Jens Erik Magnussen og Dánjal Andreasen staddir í Porto, har lutakastið fer fram.

**Verður varpað beinleiðis**

Lutakastið, sum verður sýnt beinleiðis á millum annað Eurosport, er skipað soleiðis, at tey 50 londini í pottinum eru styrkismett í fimm bólkar. Styrkismetingin er gjørt út frá, hvussu liðini hava staðið seg í altjóða høpi seinnu árini, tó at Frakland sum verjandi europa-meistari er styrkismett ovast – tað høvdu teir nú helst verið kortini.

Drigið verður síðani soleiðis, at liðini í veikasta bólkinum verða tikin úr pottinum, og sett í ymsu bólkarnar. Síðani tey úr næst veikasta bólkinum og so framvegis.

Hóast hetta ikki hevur nakrar ávirkan á útfallið, so er hetta um ikki annað sera spennandi fyri føroyska hyggjaran, tí tað kann fram til tað seinasta verða stórur spenningur um, hvat av teimum sterku liðunum vit fáa. Eitt nú sum ta ferðina til EM-2000 lutakastið, tá Føroyum enn restaði eitt mótstøðulið, og bert Týskland og Kekkia vóru eftir í pottinum.

**Venjarin bíðar**

Tá endaði tað sum kunnugt við Kekkia, og einki er at ivast í, at føroyingar flest nú ynskja, at vit fáa eina av veruliga stóru fótbóltstjóðunum í okkara bólk.

Ikki minst man hetta standa høgt á ynskislistanum hjá Fótbóltssambandinum, sum helst fær eitt fitt fíggjarligt ískoyti, um ovastu liðini eita Frakland og Ongland heldur enn Rumenia Ukraina. Eitt ískoyti sum helst eisini verður avgerandi fyri, hvør nýggi landsliðsvenjarin verður. Sum skilst, hevur FSF nú bert einar tveir veruliga kandidatar eftir til sessin, men enn avgerðin um, hvør av hesum verður settur, bíðar helst til eftir aðalfundin. Partvíst tí lutakastið í stóran mun avger fíggjarligu orkuna hjá FSF, og partvíst tí Torleif Sigurðsson ikki sigst at hava serligan hug til at taka eina somikið stóra avgerð, nú beint áðrenn hann gevst sum fótbóltsbossur.

**Bólkarnir**

Vit hava nevnt teir áður, men tað tolir tó helst eina endurtøku at skriva, hvussu teir fimm styrkisbólkarnir síggja út. So kann lesarin sjálvur gita seg fram til sín ynskisbólk.

Bólkur A: Frakland, Svøríki, Spania, Kekkia, Týskland, Írland, Rumenia, Italia, Belgia, Turkaland.

Bólkur B: Russland, Kroatia, Danmark, Holland, Jugoslavia, Póland, Ongland, Slovenia, Ukraina, Skotland.

Bólkur C: Eysturríki, Noreg, Slovakia, Ísrael, Sveis, Ísland, Bulgaria, Finnland, Grikkaland, Ungarn

Bólkur D: Cypros, BosniaHerzegovina, Hvítarussland, Wales, Estland, Lettland, Norðurírland, Georgia, Makedonia, Litava

Bólkur E: Armenia, Moldova, Albania, Føroyar, Azerbadjan, Liktenstein, San Marino, Malta, Luksemburg, Andorra.

UEFA hevur eisini gjørt av, hvørjir leikdagarnir fyri teir átta dystirnar verða. Í alt eru tíggju dystardagar settir av, og møguliga verður øll dystarskráin avgreidd, longu áðrenn føroysku umboðini koma heim, ella verður møguliga fundast um hetta á serstøkum fundi seinni. Tað er upp til londini í bólkinum at avgera sjálvi.

Dystardagarnir, sum UEFA hevur ásett eru hesir: Í 2002 eru 7./8. september, 12./13. oktober og 15./16. oktober. Í 2003 eru teir 29./30. mars, 1./2. apríl, 7./8. apríl, 10./11. apríl, 6./7. september, 9./10. september og 11./12. oktober. Sostatt er í øllum førum lagt upp til, at Føroyar fáa tríggjar dystir í ár, harav ein verður á heimavølli í september mánaði, meðan tveir verða á útivølli eftir seinasta umfarið í landskappingini.